tíðindablaðið
sosialurin

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Fyritaksstjóri: Krisjan Dahl
Ljósmyndari: Kalmar Lindenskov

Blaðfólk: Randi Jacobsen - Dagny Joensen -Jóstinus Eldesgaard - Sjúrður Skaale - Eyðun Klakkstein

Útgevari, uppseting og prent: P/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegi 26 Argjum

Postadr.: Postsmoga 78 110 Tórshavn
Telefon: 11820
Telefax: 14720

Góð kjaksending í sjónvarpinum

Oddagrein

TAÐ er sjáldan tað ber til at fáa tað tú kallar veruligt professionelt, sakligt og ærligt orðaskifti í fjølmiðlunum. Antin halda fólk seg aftur at stíga fram og siga sína hugsan ella hoyra og síggja vit bert tey somu aftur og aftur. Og alt ov oftani er kjakið merkt av persónligum briksli, lokalklandri, partapolitikki og snævurskygdum sjónarmiðjum. Men viðhvørt bragdar tað. Og so var í sjónvarpsendingini Kjak týskvøldið.

EIN siðiligur og formidlandi journalistur, ið ikki hevði í hyggju at leggja upp til kríggj og balladu og at fáa persónar at leypa framav men sum fyrst og fremst vildi upplýsa hyggjaran eigur rós uppiborið. Nettup tí hetta við samkyntum er eitt spreingistoffevni av aðrari verð og fyri mong víðgongd í Føroyum tað reina guff, tá ræður um sleppa at prædikka sín moral sum tann einasta rætta og tá hetta kann verða brúkt í stemmufiskarii var tað skilagott at velja fólk í studie, sum duga sær hógv og eru siðilig. Tá hetta er sagt kundi tú tó ynskt, at verturin til tíðir var meira ágangandi.

VIT skulu ikki her gera viðmerkingar til sjálvt innihaldið í hesum kjaki. Tað fara at vit at gera seinni. Men bert staðfesta, at føroyskir fjølmiðlar - um rætt verður lagt til rættis - eru førir fyri at leggja støði undir eitt sakligt og ærligt kjak. Ein av orsøkunum til, at hetta ber til, er tann, at tú ikki longur nýtist at brúka tey somu andlitini aftur og aftur í t orðaskiftinum, nú nýggj eru komin framat. Ikki fyri at koma við persónligum álopum, men álvaratos, hvat hava ikki persónar sum P Ellefsen og Ó Breckmann við ávikavist at gera til láturs og niðurgera øll onnur við øðrum meiningum ikki oyðilagt fyri demokratii og Føroyar!!! Vit hava brúk fyri einum meira opnum kjaki. Hetta var so eitt stig á leiðini.

Sosialurin

Lesarabrøv

Ov nógvir høvdingar og eingin indianari í fylking

Hvussu ber tað til, at verkamannafylkið ikki kann kann bliva samt um ein tingmann, sum skal inn í staðin fyri Óla Jacobsen? Eftir mínari meining kann tað vera líka mikið, um tingmaðurin er suðuroyingur ella norðoyingur. Eg haldi, at tað eru ov nógvir høvdingar og ongin indianari í fylkingini.

Tað er ein stór skomm, at tit klandrast um ein suðring ella ein norðing – er maðurin egnaður at sita á tingi, kann tað vera líka mikið, hvar í landinum viðkomandi kemur frá.

Vinarliga,

Tórun G. Isfeldt

Viðmerking til »SÆÐ & HOYRT« í Sosialinum 25.11.95

Undir heitinum »Heima er best« royndi Randi Jacobsen at umrøða sjónvarpssendingina »Eftir høvuðsjarnbreytini«. Umrøða av sendingini gerst hetta ongantíð, men Randi brigslar kvinnunum, at tær ikki hava greitt serliga nógv frá ferðini. Hví hesar kvinnur, skulu hava skyldu at greiða bløðunum frá ferðini, skilji eg ikki.

Turið Debes Hentze hevur greitt frá ferðini í sjálvum Sosialinum, men Randi skrivar samstundis, at tað fekk hon ongantíð í lag at lesa!!!

At sendingin kundi lýst betur tað, ið fram fór á stevnuni, er greitt, men føroyska kvinnurnar svara væl út frá, hvussu spurningarnir verða settir, og at lata tær somu siga tað sama 2 ferðir, er væl óneyðugt, og okkurt annað kundi eisini verið klipt betur. Hóast hetta, eri eg fegin um at sjónvarpið hevur víst stevnuni áhuga. So heldur vóna, at sjónvarpið framvegis vísir áhuga fyri slíkum tiltøkum og kanska fær meira burtur úr næstu ferð.

Sjálv var eg ikki við í Kina, men í Kvinnufelagnum í Havn hava vit havt tvey áhugaverd kvøld um altjóða kvinnuráðstevnuna í Kina. Fyrra kvøldið varð greitt frá alternativu ráðstevnuni við góðum ljósmyndum og tilhoyrandi frásøgn, og harafturat við innleggum frá nøkrum kvinnum. Seinna kvøldið vóru Helena Dam á Neystabø og Bergtóra Hanusardóttir, sum vóru føroysku umboðini á almennu ráðstevnuni, sum ST skipar fyri, og greiddu frá tí partinum. Hetta vóru sera áhugaverd kvøld, tí nógv hava tær fingið burtur úr, og væl duga tær at siga frá.

Randi skrivar: »harmiligt er, um føroyski reinførissansurin hevur forðað føroysku kvinnunum í at sæð annað áhugavert á ferðini.« Eg lann ugga Randi við, at føroysku kvinnurnar hava sæð og ikki minst hoyrt og upplivað nógv áhugavert á ferðini.

Góða Randi, eg rokni við, at tú gevur mær rætt, tá eg sigi, at enn er nógv eftir at gera hjá føroyskum kvinnum. Hugsað bert um, at hóast javnstøðulógin er viðtikin, so verður hon ikki virð. Hetta sást jú greitt, tá almennu nevndirnar vóru valdar. Betri er tí, um vit í felag savna kreftirnar at arbeiða saman og stuðla hvør aðra, enn bert at hyggja við negativum eygum eftir tí, sum aðrar gera. Tak sjálv initiativið, sum blaðkvinna hevur tú allar møguleikarnar. Í einum gomlum Kvinnutíðindi greiðir tú frá, hvat tú heldur um tíðindaflutningin. Tak tað fram aftur, tú ert har inni á tí rætta.

Inga Ellingsgaard

Amnesty International

Upplatingartíðirnar hjá Amnesty International, Føroya Deild eru: Týsdag, hósdag og fríggjadag frá kl. 13 til kl. 17. Tlf. 15816.

VALUTAKURSIR

		29.11.95	Ultimo síðsta mán.
USA	Dollari	556,85	547,60
Bretland	Pund	853,94	863,55
Týskland	Markur	387,48	388,14
Svøriki	Króna	85,54	82,39
Noreg	Króna	87,95	87,79
Frakland	Frankur	113,13	111,85
Belgia	Frankur	18,861	18,887
Sveits	Frankur	478,94	480,44
Holland	Gyllin	345,98	346,21
Italia	Liri	0,3489	0,3434
Finnland	Markur	130,49	128,81
Ísland	Króna	9,55	9,47
Eysturríki	Skillingur	55,109	55,192
Spania	Pesetas	4,559	4,484
Portugal	Escudos	3,718	3,688
Kanada	Dollari	410,63	409,72
Grikkaland	Drakmur	2,388	2,386
Japan	Yen	5,4940	5,3732
Írland	Pund	883,35	886,03
	XEU	717,89	712,58

Kelda: Føroya Sparikassi

Blindastovnur Føroya

hevur opið mándag–fríggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288.